

## Burturmist

Um tit finna okkurt, sum er gloymt ella mist, kunnu tit lata tað til Kunningardiskin á festivaløkinum. Fólk, sum hava mist okkurt burtur, kunnu spyrja eftir tí í Kunningardiskinum. Lutir, sum verða lætnir til Kunningardiskin, men ikki verða heintaðir á festivalinum, verða lætnir Politistøðini í Klaksvík eftir festivalin.

## Fløskur

Tað er ikki loyvt at hava fløskur ella eingangsíløt við sær inn á festivaløkið. Hetta forboð umfatar alt slag av fløskum og íløtum.

## Royking

Royking er bannað í Flags-tjaldinum og annars á øllum mat- og sølustøðum á festivaløkinum.

# Náttarbussar

**Skipað verður fyri eyka bussambandi á Summar Festivalinum. Strandferðslan koyrir sum vanligt um dagin, og á nátt verða eyka bussar settir inn til teirra, sum vilja sleppa heimaftur. Bussarnir koyra frá parkeringsøkinum við KÍ-høllina. Samband verður til Eysturoynna, Havnar, Vestmanna og Vágarnar.**

**Bussarnir koyra soleiðis:**
**Hóskvøldið: Kl. 03.00**
**Fríggjakvøldið: Kl. 05.00**
**Leygarkvøldið kl. 05.00**

**Bílegging: Tlf. 505220**

# Parkering

**Fleiri størri parkeringspláss eru í nánd av festivaløkinum, og fólk verða biðin um at parkera bilin forsvarliga á avmerktum parkeringsøkjum. Parkeringspláss eru til dømis við KÍ-høllina, við Skálan, við skúlarnar á Ziskatrøð og við Ósánna, við Betesda og Bókasavnið, við Christianskirkjuna, á Klaksvíksvegnum og aðrastaðni.**

# Kunningardiskur

**Summar Festivalurin hevur serligan Kunningardisk á festivaløkinum, sum fólk kunnu venda sær til, um tey hava eitthvørt ivamál viðvíkjandi festivalinum. Eisini kunnu funnir lutir latast Kunningardiskinum.**

## Fototól og kamera

**Digital fototól og kamera til privat brúk og fartelefonir við myndatóli kunnu brúkast á festivaløkinum. Professionell foto – og kameraútgerð kann bert takast inn á festivaløkið við loyvi frá festivalleiðsluni. Send umsókn til post@summarfestivalur.fo**